Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Til Løgtingið

Dagfesting: 2. februar 2021
Mál nr.: 20/02157
Málsviðgjørt: SPS
Eftirkannað: 09. desember 2020

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tryggingarvirksemi
(Tekning av ávísum sertryggingum í útlendskum tryggingarfeløgum)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi, sum broytt við løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, løgtingslóg nr. 137 frá 20. desember 2012, løgtingslóg nr. 53 frá 12. mai 2015, løgtingslóg nr. 65 frá 30. apríl 2018, løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019 og løgtingslóg, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1 verður sum stk. 9 sett:
"*Stk. 9.* Eitt tryggingarfelag í einum ES ella EBS landi kann, uttan mun til treytirnar í stk. 5, tekna henda váða í Føroyum:
1) Váða undir tryggingarflokki 5, sbrt. fylgiskjali 1.
2) Váða undir tryggingarflokki 11, sbrt. fylgiskjali 1.
3) Váða undir tryggingarflokki 12, sbrt. fylgiskjali 1, avmarkað til P & I-trygging til før við einum bruttotonsatali upp á 300 ella meiri.
4) Váða undir tryggingarflokki 13, sbrt. fylgiskjali 1, avmarkað til flogvallarábyrgd."

2. § 36 verður orðað soleiðis:
§ 36. Her í landinum er tað ikki loyvt við vinnuligum endamáli at hjálpa til við, at beinleiðis tryggingar hjá persónum, búsitandi í Føroyum, føroysk skip ella aðrir váðar, sum eru í Føroyum, verða teknaðar hjá øðrum enn
1) føroyskum tryggingarfeløgum, og
2) útlendskum tryggingarfeløgum, sum lúka treytirnar í § 22, stk. 1, ella § 23, stk. 1, umframt útlendskum tryggingarfeløgum, sum hava fingið loyvi frá Tryggingareftirlitinum, og
3) tryggingarfeløgum úr ES/EBS londum, ið tekna váða sambært § 1, stk. 9."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Tryggingareftirlitið er vorðið varugt við, at tað er ein rød av sertryggingum, undir hesum lógarkravdar tryggingar, ið verða teknaðar í útlendskum tryggingarfeløgum, ið ikki hava loyvi til at reka virksemi í Føroyum.

Bakstøðið fyri hesum skyldast í høvuðsheitum, at hesar sertryggingar ikki verða bjóðaðar út av teimum føroysku tryggingarfeløgunum ella útlendskum tryggingarfeløgum, ið lógliga kunnu reka virksemi í Føroyum.

Endamálið við lógaruppskotinum er at eftirlíka einum aktuellum føroyskum tørvi og at gera viðurskiftini lóglig, við at lata upp fyri, at tryggingarfeløg í ES/EBS londum, sum í dag ikki lógliga kunnu reka tryggingarvirksemi í Føroyum, fáa møguleika at tekna nakrar nærri ásettar sertryggingar her í landinum, hóast Føroyar ikki hava gjørt eina sínámillum avtalu við ES/EBS. Harumframt verður latið upp fyri vinnuligari miðlan av hesum sertryggingum.

1.2. Galdandi lóggáva

Við løgtingslóg nr. 3 frá 13. februar 1996 um tryggingarvirksemi varð latið upp fyri fríari kapping millum føroysk tryggingarfeløg, og harvið varð tryggingareinkarrætturin í Føroyum avtikin.

Sambært tryggingarlógini frá 1996 skuldi føroyskur váði sum meginregla bara teknast í føroyskum tryggingarfeløgum. Tey í FAS skrásettu skip við tilhoyrandi manning, útgerð og reiðskapi vóru tó ikki fevnd av lógini, og tryggingarváði, ið hoyrdi undir danska ríkið, var fevndur av lógini frá 1996.

Harumframt var í tryggingarlógini frá 1996 ein vanlig undantaksregla um, at um tey føroysku tryggingarfeløgini ikki ynsktu at tekna eina ávísa trygging, var tryggingarlógin ikki galdandi fyri henda váða, og tískil kundu øll útlendsk tryggingarfeløg frítt tekna hesar tryggingar í Føroyum.

Galdandi lóg um tryggingarvirksemi er løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi (hereftir *tryggingarlógin*). Lógin er fleiri ferðir broytt síðani, seinast við løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019.

Grundtankin í tryggingarlógini er grundaður á eina meginreglu um sínámillum rætt, t.e. at tað er ein treyt fyri at kunna gera eina avtalu við onnur lond, at tey føroysku tryggingarfeløgini fáa sama rætt í útlandinum, ið tey útlendsku tryggingarfeløgini fáa í Føroyum, sbrt. § 1, stk. 4 og 5. Tað er sostatt ikki nøkur vanlig undantaksregla eins og í tryggingarlógini frá 1996.

Í samsvari við meginregluna um sínámillum rætt er ásett í § 36 í tryggingarlógini, at vinnulig miðlan av beinleiðis váða í Føroyum bara kann fara fram til føroysk tryggingarfeløg og útlendsk tryggingarfeløg, ið lógliga reka virksemi í Føroyum í samsvari við eina gjørda sínámillum avtalu. Ásetingin forðar tó ikki fyri, at føroyingar av sínum eintingum fara

uttanlands og tekna trygging fyri váða her í landinum. Slíkar tryggingar verða fevndar av lóggávuni í tekningarlandinum.

Við tryggingarlógini varð latið upp fyri, at Føroyar kunnu gera sínámillum avtalur um felags tryggingarmarknað við ES, einstøk ES lond ella onnur lond, sum ES hevur avtalur við á tryggingarøkinum. Politiska ætlanin var, at Føroyar skuldu gera eina avtalu við ES um ein felags tryggingarmarknað, sum ikki bar á mál.

Í dag hava Føroyar gjørt avtalur við Ísland og Danmark um felags tryggingarmarknað.

Sum nevnt hava útlendsk tryggingarfeløg, ið hava heimstað í londum, ið Føroyar ikki hava gjørt sínámillum avtalur við, teknað tryggingar í Føroyum.

Til tess at meta um, hvørt hetta kann skyldast, at nakrir nærri ásettir føroyskir tryggingartakarar hava ein veruligan tryggingartørv, ið annars ikki vildi verið nøktaður, hevur Tryggingareftirlitið kannað viðurskiftini nærri.

Kanningin hjá Tryggingareftirlitinum vísir, at tað er ein rød av sertryggingum, undir hesum lógarkravdar tryggingar, ið verða teknaðar í útlendskum tryggingarfeløgum. Tryggingareftirlitið er av teirri fatan, at hetta í høvuðsheitum skyldast, at hesar sertryggingar ikki verða bjóðaðar út í Føroyum av føroysku, íslendsku ella donsku tryggingarfeløgunum, ið lógliga kunnu reka virksemi í Føroyum.

Talan er um hesar sertryggingar:

1) Skrokktrygging av flogførum
2) Ábyrgdartrygging av flogførum
3) Ábyrgdartrygging av skipum við einum bruttotonsatali upp á 300 ella meiri – P & I trygging (Protection & Indemnity)
4) Ábyrgdartrygging av flogvøllum (Airport Liability Insurance)
5) Heilsutrygging (Health Insurance)
6) Ábyrgdartrygging fyri nevnd og stjórn – D & O-trygging (Directors and Officers Liability)
7) Professionel ábyrgdartrygging – E & O-trygging (Errors & Omissions)
8) Kriminalitets- og fíggjarsviktrygging, fólkarán, tvingsil og cyberkriminalitetur (Financial Fidelity)

Í § 3 í tryggingarlógini er ásett, at Tryggingareftirlitið kann áseta serligar reglur ella frávik í sambandi við endurtryggingarvirksemi og samtrygging.

Til tess at nøkta aktuella tryggingartørvin og sum lið í at gera viðurskiftini lóglig, hevur Tryggingareftirlitið við heimild í § 3 sett í gildi kunngerð nr. 1 frá 6. juni 2019 um endurtryggingarvirksemi og samtryggingarvirksemi.

Sambært kunngerðini kunnu sertryggingar, ið eru nevndar undir pkt. 5-8, verða teknaðar í samtrygging (coassurance), um nakrar nærri ásettar treytir eru loknar. Í kunngerðini verða eisini ásettar nærri reglur um tryggingarligar avsetingar, hagfrøðiligar upplýsingar og um endurtrygging.

Fyri hinar tryggingarnar, nevndar í nr. 1-4 omanfyri, skrokktrygging av flogførum, ábyrgdartrygging av flogførum, ábyrgdartrygging av skipum við einum bruttotonsatali upp á 300 ella meiri og ábyrgdartrygging av flogvøllum, er ikki heimild í § 3 í tryggingarlógini at áseta reglur um frávik, ið loyva, at tað verður latið upp fyri, at útlendsk tryggingarfeløg frítt kunnu tekna hesar sertryggingar í Føroyum.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Lógaruppskotið hevur sum endamál at nøkta ein aktuellan føroyskan tryggingartørv og at gera viðurskiftini lóglig við at lata upp fyri, at tryggingarfeløg úr ES/EBS londum, sum í dag ikki lógliga kunnu reka virksemi í Føroyum, fáa møguleika at tekna tær undir pkt. 1.2 omanfyri, nr. 1-4 nevndu sertryggingar her í landinum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Í uppskotinum til broyting í tryggingarlógini verður latið upp fyri, at tryggingarfeløg úr ES/EBS londum frítt kunnu tekna hesar sertryggingar í Føroyum:

1) Skrokktrygging av flogførum
2) Ábyrgdartrygging av flogførum
3) Ábyrgdartrygging av skipum við einum bruttotonsatali upp á 300 ella meiri – P & I trygging (Protection & Indemnity)
4) Ábyrgdartrygging av flogvøllum (Airport Liability Insurance)

Harumframt verður sum fylgibroyting til § 1, nr. 1 í uppskotinum í § 1, nr. 2 (broyting í § 36) í uppskotinum latið upp fyri vinnuligari miðlan av hesum sertryggingum.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið varð sent til ummælis hjá tryggingarfeløgunum, tryggingarmeklarum, Fíggjarmálaráðnum og Vinnuhúsinum.

Inn komu ummæli frá: P/F Trygd, Ravnur Tryggingarmekling, Betri Trygging og Betri Pensjón. Betri Trygging og Betri Pensjón høvdu felags ummæli.

Betri Trygging og Betri Pensjón høvdu ikki viðmerkingar. Trygd tók undir við uppskotinum. Ravnur Tryggingarmekling tók undir við uppskotinum, men mælir til eisini at gera aðrar broytingar. Ummælini eru viðløgd sum skjøl 2-4.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Sum nevnt undir pkt. 1 omanfyri, er talan um at lógliggera verandi praksis, har tær í § 1, nr. 1 í uppskotinum nevndu tryggingar longu verða teknaðar í útlendskum tryggingarfeløgum.

Lógaruppskotið hevur sostatt ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tryggingareftirlitið hevur við heimild í § 1, stk. 5 í tryggingarlógini gjørt avtalu við danska Fíggjareftirlitið um felags tryggingarmarknað við Danmark. Avtalan fevnir um tænastuveitingarvirksemi millum londini bæði á lívs- og skaðatryggingarøkinum og samstarv um eftirlit við hesum virksemi. Føroysk tryggingarfeløg hava sambært avtaluni møguleika at veita tænastuveitingar í Danmark, eins og donsk tryggingarfeløg kunnu veita tænastuveitingar í Føroyum.

Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar, umsitingarligar ella aðrar avleiðingar orsakað av avtaluni.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Eftir Hoyvíkssáttmálanum kunnu føroysk tryggingarfeløg reka tryggingarvirksemi gjøgnum eina deild í Íslandi ella við tænastuvetingum í Íslandi eins og íslendsk tryggingarfeløg kunnu reka tryggingarvirksemi gjøgnum eina deild í Føroyum ella við tænastuveitingum í Føroyum. Tað fevnir bæði um lívs- og skaðatryggingarøkið.

Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar, umsitingarligar ella aðrar avleiðingar orsakað av sáttmálanum.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið kann ikki elva til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, og lógaruppskotið ger ikki inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið áleggur ikki skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar, so sum upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu ella t.d. krøv um loyvi.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1

Til nr. 1 (1, stk. 9)

Ásetingin er eitt undantak til meginregluna í tryggingarlógini um sínámillum rætt, t.e. kravið um at tey føroysku tryggingarfeløgini skulu hava sama rætt í útlandinum, sum tey útlendsku tryggingarfeløgini fáa í Føroyum, sbrt. § 1, stk. 4 og 5 í tryggingarlógini.

Sambært uppskotinum kann eitt tryggingarfelag, ið er heimahoyrandi í einum ES/EBS landi, frítt og uttan nakra fráboðan tekna tann í uppskotinum § 1, stk. 9 nevnda váða í Føroyum. Talan er um henda váða:

Nr. 1. Váða undir tryggingarflokki 5, sbrt. fylgiskjali 1, t.e. skrokktrygging av flogførum.

Nr. 2. Váða undir tryggingarflokki 11, sbrt. fylgiskjali 1, t.e. ábyrgdartrygging av flogførum.

Nr. 3. Váða undir tryggingarflokki 12, sbrt. fylgiskjali 1, avmarkað til P & I-trygging (Protection & Indemnity) til før við einum bruttotonsatali upp á 300 ella meiri.

Nr. 4. Váða undir tryggingarflokki 13, sbrt. fylgiskjali 1, avmarkað til flogvallarábyrgd.

Til nr. 2 (§36)
Í § 36 í tryggingarlógini er ásett, at vinnulig miðlan av beinleiðis váða í Føroyum bara kann fara fram til føroysk tryggingarfeløg og útlendsk tryggingarfeløg, ið lógliga reka virksemi í Føroyum í samsvari við eina gjørda sínámillum avtalu.

Sum fylgibroyting til § 1, nr. 1 í uppskotinum verður í § 1, nr. 2 í uppskotinum skotið upp, at tað í § 36 verður sett eitt ískoyti við tilvísing til § 1, stk. 9 í uppskotinum soleiðis, at vinnulig miðlan av sertryggingum, nevndar í § 1, nr. 1 í uppskotinum, er í samsvari við lógina.

Til § 2
Eftir uppskotinum kemur lógin í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 2. februar 2021

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

Fylgiskjøl
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Trygd
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Betri Trygging og Betri Pensjón
Fylgiskjal 4: Hoyringarsvar frá Ravni Tryggingarmekling